Umsett úr donskum. Í ivaspurningum verður víst til donsku upprunaútgávuna.
https://www.ft.dk/ripdf/samling/20231/redegoerelse/R5/20231_R5.pdf

Frágreiðing, ið uttanríkismálaráðharrin (Lars Løkke Rasmussen) hevur útgivið 12. oktober 2023

# Frágreiðing

um

# UTTANRÍKIS- OG TRYGDARPOLITISK ÆTLAN 2023

(Skrivlig frágreiðing)

## Fororð

Seinasta uttanríks- og trygdarpolitiska ætlanin varð fram-løgd fáar vikur, áðrenn fyrstu russisku stríðsvognarnir koyrdu inn um ukrainska markið 24. februar 2022. Blekkið náddi valla at torna, áðrenn ein nýggjur heimspolitiskur veruleiki kom sum eitt óløgi. Nýggja ætlanin, tú situr við, kemur tí ikki ein dag ov tíðliga. Hon setir kósina, hvussu vit best tryggja donsk áhugamál og virði í heiminum, sum hann er á at líta í dag. Við nýtslumerktari hugsjón sum yvirskrift.

Tað merkir í fyrsta lagi, at vit mugu síggja heimin, sum hann í veruleikanum er: Ótryggur, óforsagnarligur og torr-greiddur. Onkuntíð harðrendur. Russland virðir ikki altjóða lóg. Kina vil hava størri rásarúm. USA eygleiðir nú gongdina í Asia. Har er meira spenningur og størri kapping enn leingi hevur verið. Tað verða vit noydd at ætla um Vit mugu ikki vera góðvarin. Lond seta egin áhugamál fremst og gera ikki tað, ið best tænir Danmark. Um vit ikki minnast tað, verður illa statt hjá okkum.

Samstundis skulu vit halda fast í trúnni á okkum sjálvi. Tað nyttar einki at fjala sig undir songini og vóna, at stormur-in fer framvið. Vit skulu reka ein virknan, framsøknan og bjartskygdan uttanríkispolitik við upprunastøði í teimum virðum, vit sjálvi stava frá. Tí vit trúgva upp á, at fólkaræði, frælsi og mannarættindi geva betri lív sama, hvar í heiminum, ein býr. Veruleikasansur merkir ikki, at alt er eins gott, og at tað er týdningsleyst, hvat ein stríðist fyri. Tí er nýtslumerkta hugsjónin heldur ikki ein uppgerð við virðini hjá okkum. Tvørturímóti.

Um vit skulu seta dám á umheimin, koma vit ikki langt einsamøll. Danmark er ein mikil tjóð, men eitt lítið land. Tí standa viðurskiftini við næstu vinirnar sum ein hornasteinur í ætlanini. Tíðin krevur eina heilhugaða danska hugbinding í ES. Og í eitt ES, ið fettir sær og fyllir meira á utanríkis-politiska pallinum. ES skal ikki bara vera ein samkomustaður, men tora at vera ein leikari við egnum rætti. Um vit savna megina, kann 2 + 2 væl gerast 5.

Tú situr ikki við eini tíðindaskrá framman fyri teg – men við nýggju uttanríkis- og trygdarpolitisku ætlanini hjá al-menna Danmark. Skjalið, ið stjórnin fer at stýra eftir, tá vit skulu taka avgerðir um hvørt av sínum í heiminum. Og sum vit fara at brúka sum upprunastøði hjá mongum øðrum ætlan-um, ið fara at koma í koman-

di tíð. Men hon er ikki heilt uttan nýggjar hugsanir og sjónarmið. Teimum gleði eg mig til at arbeiða víðari við.

Sera góðan lestrarhug.
*Lars Løkke Rasmussen, uttanríkismálaráðharri – mai 2023*

## Innleiðing

Nøkur árstøl og dagfestingar verða løgd í geyma. Tey vísa á umskifti í heimssøguni.

9. november 1989 fall Berlinmúrurin, og vit kundu fagna endan á eini langari og myrkari tíð við køldum kríggi í Evropa.

11. september 2001 boðaði frá eini nýggjari tíð við alheims-fevnandi yvirgangshóttanum.

24. februar 2022 vaknaðu vit upp til ólógliga álopskríggið hjá Russlandi móti Ukraina. Myndir av áleypandi russiskum hermannahópum og bumbuatsóknum at ukrainskum býum gjørdu endaliga greitt, at tíðin, har vit høvdu innheintað frið-arvinningsbýtið, var at enda komin: Aftur er kríggj á evrop-iska meginlandinum. Álitið hjá okkum á, at frælslynta altjóða skipanin einans fór at hava frið og framgongd við sær, var ikki satt í roynd og veru.

Á baktjaldinum av russisku innrásini í Ukraina er Evropa í einum nýggjum og herdum uttanríks- og trygdapolitiskum veruleika. Tað er ein støða, ið ikki broytist í næstum. Sama, hvussu gongdin í krígnum verður, verður næstu mongu árini tørvur á eini víðfevndari tillaging av uttanríkis- og trygdar-politikkinum hjá okkum.

Saman við felagum og sameindu okkara hava vit síðani russisku innrásina sýnt eitt virðingarvert samanhald í svari-num upp á størstu trygdarpolitisku avbjóðing í ártíggju. Víkj-ast skal ikki frá tí.

Tað skulu vit gera í NATO, sum er hornasteinurin hjá danskari verju og trygd. USA fer áhaldandi at vera týdningar-mesti trygdarpolitiski sameindi hjá Danmark, og vit skulu áhaldandi stimbra vestanhavsbandið. Danmark skal saman við USA og hinum felagum okkara standa við grundleggjadi sjónarmið okkara í eini regluskipaðari altjóða skipan. Í framtíðini skulu Evropa og Danmark bera størri ábyrgd í NATO.

Tað skulu vit gera í ES, sum við síni ráðsnaru og sam-ljóðandi andgerð í sambandi við krígið í Ukraina hevur sýnt nýggja tyngd sum heikspolitiskur leikari. Tað fer framyvir í enn størri mun at verða ein donsk aðalraðfesting at stimbra evropska samstarvið breitt, so ES kann halda á við at vera ein drívmegi fyri friði og frælsi, og leggja til trygdina í Evropa og betri leggja sína búskaparligu tyngd í at verja evropisk áhugamál og virði.

Og tað skulu vit gera gjøgnum ST og margsíðaða sam-starvið, sum setir karmarnar og felags reglverkið. Ein reglu-grundað heimsskipan er avgerandi hjá lítlum londum sum Danmark og hjá eini munagóðari handfaring av heims-umfatandi avbjóðingum. Vit skulu taka heimsumfatandi ábyrgd og arbeiða uppbyggiliga fyri at finna nýtslumerktar loysnir, heimsins lond kunnu savnast um.
Uttanríkis- og trygdarpolitiska ætlanin hjá stjórnini setir yvirskipaðu ýtini, hvussu Danmark skal halda kós í einum heimi, ið týðiliga er broyttur eftir 24. februar 2022.

Vit skulu framhaldandi stuðla verjustríðnum hjá Ukraina og landsins evropisk sameining. Vit skulu stimbra danska verju og trygd og vera meiri við í ræðanini og verjuni hjá NATO, serliga í nærøkinum. Tað verður samstundis ein av týdningarmestu uttanríkispolitisku uppgávunum hjá Evropa at stuðla grannunum hjá ES eystanfyri og á Vesturbalkan, sum standa í andglettinum av óstøðugerandi átøkunum serstakliga hjá Russland.

Vit skulu tillaga okkum ein heim merktan av herdari heimsfevnandi bragdigari kapping. Vit eru vitni til stórar fólkafrøðiligar og búskaparligar broytingar, ið skrykkja í sínámillum valdsviðurskiftini. Serstakliga Kina fyllir meira á alheimspallinum og arbeiðir fyri at broyta partar av altjóða skipanini til egnan fyrimun. USA hevur av somu orsøk gjøgnum fleiri ár snarað strategiska brennidepilin móti Asia. Samstundis koma nýggir leikarar á alheimspallin, sum er við til at økisskipa heimin. Samstundis minkar lutfalsliga tyngdin og árinið hjá Evropa – og við tí eisini Danmark - í heiminum. Tað økir um óforsagnarleikan, kappingina og fjøltættið og setir krøv um herda danskan og evropiska uttanríkispolitiska raðfesting. Men tað skapar eisini nýggja møguleikar fyri samsamstarv og samvinnu. Evnini at stimbra samvinnu okkara um allan heimin verður avgerandi.

Vit skulu handfara avleiddu avleiðingarnar av álops-krígnum hjá Russlandi, ið síggjast um allan heim, og sum í mongum førum hava stimbrað máttir og avbjóðingar, sum eru. Matvørukreppa, orkukreppa og umskiftandi heims-búskapur ávirkar lond og íbúgvar, sum í mongum førum eisini eru rakt av veðurlagsbroytingum og náttúru-vanlukkum. Alt skapar gróðrarlíkindi fyri búskaparligari og politiskari óstøðu við vanda fyri nýggjum kreppum, víðgongd og øktari óregulligari fólkaferðing. Vit skulu fyrireika okkum til at handfara eina nýggja fólkaferðingarkreppu, ið kann leggja trýst á savningarmegina í Evropa.

Vit skulu stimbra mótstøðuførið hjá Danmark og Evropa breitt. Uttanríkis- og trygdarpolitikkurin verður í vaksandi mun vavdur saman við innanríkispolitikki. Ymisligar kreppur blandast upp í hvørja aðra og hanga óloysiliga saman. Til dømis tá altjóða hendingar ávirka  veitingarkervið hjá okkum, ella tá vit skulu minka avgerandi bundinskapin hjá okkum fyri at minka uttanríkis- og trygdarpolitiska viðbreknið hjá okkum. Alheimsfevnda gongdin kann samstundis ávirka innlendis trygdina hjá okkum. Vit skulu tí stimbra evnini hjá okkum at hugsa tvørturum, so vit munadygt kunnu handfara nýtt viðbrekni og nýggjar hóttanir.

Vit skulu framhaldandi vera eitt grønt undangonguland. Vit skulu halda fram við eyðsýnda danska veðurlagssnúna átaki-num til at handfara veðurlagskreppuna, sum er størsta al-heimsfevnandi avbjóðing í 21. øld, ið ávirkar øll lond, allar geirar og vistskipanir. Og vit skulu troyta mongu nýggju møguleikarnar, sum grøna skiftið eisini inniheldur fyri Danmark.

Vit skulu eisini framyvir vera talgildir slóðarar. Skilt út frá alheimsfevndu tøkniligu kappingini skulu vit útbyggja dan- skar styrkistøður innan øki sum skamtatøkni. Samstundis skulu vit arbeiða fyri eini ábyrgdarligari tøkniligari menning alheimsliga.

Virkini eru týdningarmiklir felagar, og vit skulu undirstuðla og arbeiða nær saman við teimum fyri at tryggja, at teir kunnu halda kós í einum veruleika merktum av øktari ótrygd, øktum margtætti og øktari heimspolitiskari kapping.

Nýggi heimspolitiski veruleikin krevur, at danskur uttanríkis- og trygdarpolitikkur tillagar seg fyri framhaldandi at kunna verja og stuðla donsk virði og áhugamál. Tað krevur veruleikakenda greining, veruleikasans og eina javnvigaða tilgongd nær í samstarvi við evropiskar og amerikanskar felagar. Danmark skal vera hjástatt í øllum heiminum. Tað krevur, at vit økja virksemið og uppbyggja nýggj sambond og javnmetta samvinnu um allan heim. Alt hetta krevur eitt stimbrað dansk sendistovuvirksemi, sum er fyrireikað til at handfara tær avbjóðingar, ið fyri framman eru.

Danskur uttanríkispolitikkur skal framhaldandi byggja á fólkaræði og grundleggjandi frælsisrættindi: At øll menniskju verða født við somu rættindum og hava frælsi til millum annað at taka til orðanna, hugsa, trúgva og savnast, sum einum lystir. Tað er støði í tí, at vit skulu vera við í heiminum. Vit fylgja samstundis best okkara áhugamálum og virðum við at grundleggja okkum á eina veruleikakenda

meting av tí heimi, vit eru í. Vit skulu hava upphavsstøði í felags áhugamálum og vera í javnsettum samskifti. Vit skulu kunna okkum betri við sjónarmið, tørv og áhugamál hjá øðrum londum, og bjóða loysnir. Einans soleiðis kunnu vit koma á felags mál og munadyggari stimbra fólkaræði, virðing fyri mannarættingum og burðardyggari menning. Um vit skulu ansa eftir Danmark, hava vit tørv á fleiri felagum og vinum í framtíðini, ikki færri.



## KAPITTUL 1: Herd trygdarstøða í Evropa

Álopsskríggið móti hjá Russlandi móti Ukraina er ikki bert ein hóttan móti friðinum og trygdini í øllum Evropa. Tað er eisini eitt brot á heilt grundleggandi meginreglur í ST-sátt-málanum. Russland roynir við hernaðarmegi at broyta mørk og endurnýggja eina trygdarskipan grundaða á áhugaøki hjá stórveldunum. Eydnast tað Russlandi at náa sínum hermáls-ligu mál, verður heimurin eitt vandamiklari staður, serliga hjá lítlum londum.

Tí fer stuðulin til evnini hjá Ukraina at verja sítt fullveldi og sín landøkisfullkomileika at verða eitt frammarlagt her-málsligt raðfesti hjá Danmark næstu mongu árini. Vit skulu samstundis vera fyrireikað til, at sama, hvussu endin av krígnum verður, fara politisku, hernaðarligu og landøkisligu tráanir Russlands at verða ein hóttan móti Danmark og Evropa í mong ár.

Herda trygdarstøðan fer at seta karm um uttanríkis- og trygdarpolitikkin hjá Danmark komandi árini. Danmark og Evropa fara á mongum økjum at verða noydd at laga seg til ein heimspolitiskan veruleika merktan av djúpum misáliti, drúgvum samanbresti og ófyrisøguleika. Trygd og kreppu-handfaring fara at fylla meira og koma nærri inn í okkara gerandisdag.

### Stimrað verja og trygd í Danmark og Evropa

Donsk og evropisk verja og trygd skulu stimbrast fyri at kunna handfara eyðkendar eins væl og blendingsligar hóttan-ir. NATO og eitt sterkt handanhavsligt band er enn mondulin í okkara trygd. Vit skulu enn stimbra samstarvið í Landa-samgonguni og lyfta okkara part av byrðuni. Stjórnin fer tí at framflyta verksetingina av tí varandi hevjanini av útreiðs-lunum til verju og trygd til 2 pst. av BTÚ til 2030. Talan er um eina søguliga stóra og langskygda íløgu í trygdina hjá okkum. Komandi verjusemjan skal vera við til at gera, at vit í Danmark í størri mun kunnu taka okkum sjálvi av okkara felags trygd og taka okkara part av ábyrgdini. Tað geldur serliga í okkara nærøki í Baltalondum og Eystasaltleiðini, í Eysturevropa umframt í Arktis og Norðuratlantshavi. Sam-stundis skulu vit varðveita møguleikarnar hjá okkum fyri at kunna vera við í at varða um uppgávur aðrastaðir í heiminum í karminum um til dømis NATO, ES og ST. Endaliga hava vit orsakað av landafrøðiligu støðuni hjá Danmark ábyrgd av at veita stuðul á danskari grund til tey sameindu.

Herda trygdarpolitiska støðan merkir harafturat, at tørvur er at víðarimenna NATO, so Landasamgongan kann handfara framtíðar hóttanir, undir tí álvarsligu hóttanina úr Russlandi. Tað fer at krevja styrkta ræðan og styrkta verju, millum annað gjøgnum styrktu tilbúgvingina og framskotnu verjuna hjá NATO, sum Danmark famhaldandi fer at stuðla.

Evropa skal samstundis átaka sær størri ábyrgd av egnari trygd. Danmark hevur áhuga í virknum stuðli til økt verju-samstarv í ES nær í samspæli og fylling við NATO. Ein stórur meiriluti av dønum slættaðu 1. juni 2022 vegin við at ógilda verjufyrivarnið. Tað sendi eitt sjónskt tekin um, at Danmark er til reiðar at taka størri samábyrgd av trygdini í Evropa og nærøkjunum hjá okkum.

Eitt stimbrað verjusamstarv í ES letur nýggjar møguleikar upp fyri Danmark. Tað geldur millum annað á økjum sum nettrygd, blendingsligum hóttanum og hernaðarligum flytføri umframt á granskingarliga økinum. Tað geldur eisini útbúnaðarsamstarv og á verjuídnaðarliga økinum, har Evropa hevur stratekiskar avbjóðingar. Við festi í bæði NATO og ES hevur Danmark áhuga í at troyta og skyrkja hesar møguleikar sendiharraliga, hernaðarliga og vinnupolitiskt. Danmark skal eisini vera uppi í at uppbyggja evropiskan verjuídnaða og stimbra hugbindingina hjá virkjum okkara at altjóða sam-starvinum til gagns fyri okkara trygd, múgvinskap og vælferð.

### Norðurlendskt verjusamstarv og trygd í Eystrasalt-økinum

Nýliga upptøkan hjá Finnlandi og komandi upptøkan hjá Svøríki í NATO stimbrar Landasamgonguna. Saman við ógildaða verjufyrivarinum merkir tað, at Norðurlond nú standa meira samankomin enn nakrantíð áður á trygdar- og verjupolitiska økinum. Tað skapar nýggjar møguleikar hjá einum sterkari norðurlendsku trygdarpolitiskum og hernaðar-ligum samstarvi, undir tí venjingarvirkni og verju-ætlanarsamskipan. Danmark skal hava eina miðstøðuliga staðseting í at menna hetta samstarv.

Eystrasaltøkið fær vaksandi týdning, og Danmark hevur hermálsligan áhuga í at stimbra sambondini við Baltalond. Saman við norðurlendsku felagunum hevur Danmark eina serlig ábyrgd av trygdini í Eystrasaltøkinum. Tað geldur ikki minst í mun til Baltalond, sum í serliga stóran mun kenna hernaðarligu og blendisligu hóttanirnar úr Russlandi.

### Arktis og Norðuratlantshav

Herda alheimsfevnda hermálsliga kappingin hevur eisini týdning fyri Arktis og Norðuratlantshav. Russland hevur seinastu árini økt hernaðarligu máttstøðuna og útbygt her-naðarligu megina í Arktis. Sjálvt um Russland beinleiðis viknar hernaðarliga orsakað av krígnum í Ukraina, ger støðan Russland til ein meira óforsagnarligan leikara – eisini í Arktis og Norðuratlantshavi. Tað mugu vit saman við okkara sameindu hava støðu til.

Kríggið í Ukraina hevur avleiddar avleiðingar fyri økið. Sjónskast er, at støðgur er komin í samstarvið í Arktisráði. Samstundis er nýggi limaskapurin hjá arktiska ríkinum Finnlandi, og tann komandi hjá arktiska ríkinum Svørríki ein jalig gongd. Limaskapurin hjá teimum fer at stimbra trygdina og samstarvið í NATO umframt í Arktis og Norðurtlantshavi.

Vit fara at arbeiða fyri at tryggja, at Arktis ikki gerst ein smanbrestingarpallur við uppruna aðrastaðir í heiminum. Tí fer stjórnin nær í samstarvi við stjórnirnar í Grønlandi og Føroyum – og við altjóða samstarvsfelagarnar hjá okkum – framhaldandi at arbeiða fyri lágspenningi og víðari menning og verju í arktiska økinum. Eisini sjálvt um tað er vorðið torførari. Hermátturin hjá Russlandi í Arktis er í stóran mun óskerdur. Kina hevur langskygd áhugamál í økinum. Vit fara at arbeiða fyri friði og trydd í Arktis. Hjáveran hjá verjuni skal tryggja bøtt eftirlit og fullveldishandhevjan umframt at vera við til at røkja áhugamálini hjá teim sameindu og NATO í økinum.

### Eyðsýndur og áhaldandi stuðul til Ukraina

Ukrainska verjustríðið móti Russlandi er eisini eitt stríð fyri frælsinum hjá Evropa, fyri evropiskari trygd og fyri al-heimsfevndu reglgrundaðu skipanini. Saman við felagum og sameindum skal Danmark stuðla Ukraina í at verja seg og endurvinna sín landøkissjálvræðisrætt og sjávavgerðarrætt. Tað krevur framhaldandi hernaðarliga, búskaparliga og menniskjaliga hjálp. Einans Ukraina sjálvt kann avgera, nær tíðin er búgvin til samráðingar, og hvussu ein haldgóð loysn kann vera. Stuðul okkara til Ukraina skal vera við til at seta landið í sterkast møguligu støðu tá.

Stjórnin fer at halda fram við eyðsýnda danska stuðlinum til Ukraina, so leingi tørvur er á tí. Tað fara vit at gera bæði tjóðarliga og serliga gjøgnum evropiska og handan-havsliga samstarvið. Síðani krígsbyrjan hava vit latið víð-skygda og langskygda hjálp. Við at hava stovnað tjóðarliga Ukraina-grunnin tryggja vit framhaldandi hernaðarstuðul, almannastuðul og stuðul til vinnuátøk til og í Ukraina.

Sjálvt eftir eitt krígslok fara Danmark og okkara sameindu og felagar at skula verða heft at trygdini í Ukraina. Tað fer at krevja framhaldandi stuðul við her-

naðarútbúnaði og venjing við atliti til at stimbra mótstøðumáttin hjá Ukraina, so tað kann verja seg sjálvt fyribils og ræða Russland í longdini. Vit fara eisini framhaldandi at skula vera í kjakinum um langskygdu trygdini hjá Ukraina, undir tí stimbra samvinnuna hjá NATO við Ukraina á leiðini móti komandi limaskapi.

Samstundis stendur Ukraina framman fyri einum veldigum endurbyggingarátaki. Eftirspurningur verður eftir førleikum og loysnum, sum donsk virki bjóða, til dømis innan grønt skifti, orkuundirstøðukervi, vatn og matvørur. Danmark og danskt vinnulív hava tí møguleika at spæla ein týdningar-miklan leiklut í endurbyggingini, og donsk virki fara at kunna veita støðufesti og búskaparliga menning í Ukraina við at skapa vøkstur og arbeiði. Tað geldur ikki minst í Mykolaiv, har Danmark hevur átikið sær eina serliga ábyrgd av endur-byggingini, eins og vit skulu stimbra myndugleikasamstarvið á til dømis orkuøkinum. Ukraina hoyrir heima í evropisku ættini. Tað fer krevja djúptøknar, bygnaðarligar, politiskar, búskaparligar og fyrisitingarligar broytingar, áðrenn Ukraina lúkar ES-upptøkutreytirnar. ES eigur tí at spæla ein mið-støðuligan leiklut í at endurbyggja Ukraina, sum skal festast í hesar broytingar. Danmark hevur fyrr verið við til at gera lond búgvin til ES-limaskap, og vit skulu eisini virkin stuðla evropisku leiðina hjá Ukraina. Til dømis innan karmarnar av eini so nevndari tvíætlan, ið ger myndugleikasamstarv mill-um Ukraina og ES-limalond møguligt.



## Áráðið aftursvar til Russland

So leingi Russland heldur fram sum áleypari og ger seg inn á landøkis-sjálvræðisrættin hjá Ukraina, skal Danmark saman við felagum og sameindu okkara støðugt arbeiða fyri at av-mergja og avbyrgja Russland frá umheiminum. Vit skulu tryggja, at Russland ikki røkka síni hermálsligu mál í Ukraina. Vit skulu ikki víkja frá, at herseting og brot á altjóðarættin ikki lønar seg. Tí skulu vit arbeiða fyri tí breiðast møguliga alheimsfevnda stuðlinum til Ukraina. Og vi skulu mótmæla greitt mótvegis londum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis styðja framhaldandi hersetingini hjá Russlandi.

Tað er ikki nakað, Danmark einsamalt kann gera. ES-semjan og ein samskipað tilgangd saman við felagum og sameindu okkara er okkara bestu kort. Stjórnin fer at arbeiða fyri at varðveita tey harðast gjørligu revsitiltøkini, sum kunnu av-mergja russisku krígsmaskinuna og veita Russlandi svárar útreiðslur fyri kríggið. Vit skulu fara móti falssøgunum og víðgongdar-gerðini av russiska samfelagnum hjá Kreml við stuðli til russiskar fólkaræðiskreftir, borgarasamfelagsvirkandi og ó-heftar miðlar.

Tey ráðandi í Russlandi skulu dragast til svars fyri tær brotsgerðir, ið eru framdar í Ukraina. Her kann Danmark við okkara megnaða umhvarvi innan altjóða lógsøking og rættvísi vera virkið í viðkomandi ítøkum at tryggja, at tað, tá tíðin kemur, verður ásett rættarlig ábyrgd, millum annað við at savna próvtilfar í sambandi við krígsbrotsgerðir í Ukraina.

## Økt virksemi í nærøkinum hjá ES

Í Moldova og Georgia umframt á Vesturbalkan roynir ser-liga Russland at arbeiða ímóti sjálvræðinum hjá londunum og teirra evropisku stevnu og tvíhalda í síni óstøðuggerandi ávirkan.

Støðufestið hjá londunum er viðbrekið eftir áratíggju við veikum stovnum, innlendis spenningum og í nøkrum førum russiskari hernaðarhjáveru. Mong lond eru búskaparliga og serliga orkuliga heft at Russlandi og viðkvæm fyri blendis-ligum hóttanum. Sjálvt um evnini hjá Russland at óstøðug-gera árendu grannalondini hjá ES á ávísum økjum eru viknað, og eftirsketnið er mest vent móti Ukraina, og framvegis munandi hóttan móti sjálvræðinum og mótstøðuførinum hjá londunum. Kina arbeiðir samstundis miðvíst móti at fáa ávirkan á grannalondini hjá Evropa eystanfyri og á Vestur-balkan, millum annað gjøgnum undirstøðukervis-verkætlanir. Ein tann týdningarmesta uttanríkispolitiska uppgávan hjá Evropa næstu mongu árini verður at styrkja sambandið við árendu grannalondini hjá Evropa. Tað snýr seg um at stuðla tey í at uppbyggja mótstøðuføri og minka bundinskapin hjá teimum og við tí eisini viðkvæmið fyri roynd hjá øðrum at fáa neiliga ávirkan.

Stuðulin til politiska og búskaparliga nútívargerð í lond-unum er av alstórum týdningi í mun til at tryggja stovn-festingina hjá teimum í evropiska felagsskapinum og undir-stuðla tráanina hjá teimum um ES-limaskap. Vit skulu stimbra virksemið hjá okkum og hjáveruna í londunum. Danmark skal hjálpa við at styrkja stovnarnar í londunum, so teir kunnu lúka ES-upptøkutreytirnar. Tað skal fara fram í myndugleikasamstarvi við danskar felagar til dømis í mun til muturmótstríð, orkuskifti og miðspjaðing. Vit skulu hug-savna okkum um unga ættarliðið, tí tað er framtíðin hjá londunum. Her fara ungdómsfelagsskapir eisini at kunna hava ein týdningarmiklan leiklut, til dømis gjøgnum skifting. Harafturat fer eitt stimbrað samstarv við borgarasamfegøg og staðbundnar miðlar verða við til at herða mótstøðuførið hjá londunum mótvegis russisku ávirkingarroyndunum og rang-kunning.

Sjálvt um londini í Norðurafrika hava eitt annað upp-havsstøði enn áren-

du grannalondini hjá ES eystanfyri og á Vesturbalkan, leika mangir av somu máttunum eisini á her. Harafturat er óregluliga fólkaferðartrýstið uppaftur ein hóttan móti londunum – og móti Evropa. Eisini tessvegna skal ES arbeiða fyri nýggjum sambondum og sterkum javnbjóðis samvinnum ikki minst við okkara norðafrikansku grannalond, sum kann undirstuðla sjálvstøðuna hjá londunum og bú-spakarliga framgongd og við tí samstundis økja um trygdina hjá Evropa.

### Eitt stimbrað ES á alheimsleikpallinum

ES-samstarvið er týdningarmesti pallurin hjá donskum uttanríkispolitikki og avgerandi fyri múgvinskapin, trygdina og tryggleikan hjá okkum. Danmark hevur tí áhuga í, at ES heldur fram við at menna og stimbra sín heimspolitiska týdning. Eitt ES við størri heimspolitiskum mátti fer eisini at styrkja javnvágina í viðurskiftunum tvørtur um Atlantshav.

Danmark skal arbeiða fyri virkisfúsum ES, sum megnar at gagnnýta sína búskaparligu tyngd til at fáa árin á heimin, fáa alheimsfevnda samvinnu í lag og verja evropisk áhugamál og virði. Búskaparligu revsitiltøkini móti Russlandi eru uttan líka og eitt greitt dømi um, at eitt sameint ES kann og skal brúka sín búskaparliga mátt til at fremja uttanríkispolitisk mál. Vit skulu styrkja máttin hjá Danmark á revsiatgerðar-økinum, so vit í størri mun kunnu vera við í revsitiltøkunum hjá ES. Vit skulu tryggja eina munadygga verkseting og handhevjan tvørtur um ES umframt eitt felags stríð ímóti at víkja uttan um revsitiltøkini.

Fram ímóti ES-formansskapinum í 2025 fer stjórnin at stimbra evropapolitiska átakið hjá Danmark og taka stig til eina nýggja evropapolitiska avtalu. Millum annað fyri at tryggja, at Danmark kann vera virkið í at menna evropiska samstarvið við nýggju heimspolitisku treytunum í huga. At víðka ES er flutt uppeftir í dagsskránni orsakað av herdu trygdarpolitisku støðuni. Danmark skal framhaldandi halda fast í, at nýggj limalond í fullan mun skulu lúka ES-upp-tøkutreytirnar. Tað er best hátturin at tryggja, at ES gerst so sterkt og samanhangandi sum gjørligt. Av somu orsøk skulu vit virkin vera við í at hjálpa londunum at verða til reiðar til limaskap. Útlitið er eitt ES við góðum 30 limalondum. Vit skulu tí vera virkin í umráðingini um, hvussu stjórnarmálini og spælireglurnar hjá ES skulu tillagast, so ES eisini verður búgvið til víðkanina.




## KAPITTUL 2: Alheimsfevnd samvinna og samgongu-uppbygging

Lutfalsligu valdsviðurskiftini í heiminum broytast. Vektin á Evropa í heiminum minkar, meðan onnur lond og øki vaksa bæði búskaparliga, fólkafrøðiliga og tøkniliga.

Alheimsfevnda framsøknið og tyngdin hjá Kina eru vaksin skilliga. Kina hevur samstundis grundleggjandi ynski um at broyta partar av altjóða spilireglunum og standlunum, so tey í stóran mun eru sambærilig við politisku skipanina og áhugamálini hjá Kina.

Eisini onnur lond og staðbundin stórveldi koma á alheims-pallin. Tey hava eitt heilt natúrligt ynski um at umgera lutfals-ligu vektina hjá teimum til ávirkan. Hvussu hesi lond staðseta seg í alheimsfevndu hermálsligu kappingini fer at fáa stóran týdning fyri, hvussu framtíðarliga altjóða skipanin verður. Tað verður ein økt kapping og fjøltætti at halda kósina í. Men eisini møguleikar fyri nýggjari og skapandi samvinnur alheimsliga.

Henda gongd merkir, at vit skulu endurhugsa, hvussu vit fara fram í heiminum. Har er ikki eittans svar, ið geldur í øllum førum. Men sum heild fer at verða tørvur á øktari hug-binding og javnstøðis nýggjum samskifti. Tað krevur, at vit stuðla máttmiklum og virkisfúsum ES á alheimspallinum. Og at vit arbeiða fyri, at ST ger munadyggar loysnir við atliti at alheimsfevndum trupulleikum, sum eingi lond kunnu loysa einsamøll.

## Stríðið um ávirkan

Álopskríggið hjá Russlandi hevur havt alheimsfevndar avleiðingar við sær, í mongum førum fleiri túsund kilometrar frá vígvøllinum í Ukraina. Hjá mongum londum uttan fyri Evropa hevur kríggið í Ukraina verið við til at ger ilt verri. Prísirnir á støðisligari neyðsynd sum matvørum og orku eru øktir, samsstundis sum tað er vorðið torførari at tryggja fígging til langtíðarhaldføra búskaparliga menning. Mong lond síggja dygga samhugan hjá Vesturheiminum við Ukraina, men uppliva ikki sjálvi at verða hoyrd, tá tey verða ávirkað av torføru alheimsfevndu gongdini.

Í kjalarvørrinum av kovid-19-alheimsfarssóttini hava heimsumfatandi avleiðingarnar av russisku innrásini í Ukraina avdúkað, at ES og Vesturheimurin hava fingið av-bjóðing í kappinigini um ávirkan, sum fer fram um allan heimin. Serliga Kina og Russland royna, hvørt á sín hátt, sera virkin at økja ávirkan. Í mongum londum bjóða tey íleggingar, samstarv og stuðul, ofta beind beinleiðis móti staðbundnum broddborgarum, sum tey royna at ávirka viðvíkjandi uttan-ríkispolitisku stevnuni hjá londunum.

Tað er eitt greiðskuevni, Danmark og ES skulu handfara saman við okkara felagum.

## Javnbjóðis samvinna

Vit skulu skapa javnbjóðis samvinnu. Uttan at linka krøv um gjøgnumsskygni og ábyrgd skulu vit hava ábyrgd av freistandi og burðardyggari loysnum, sum koma eftir-spurninginum hjá londunum á møti og kunnu stimbra menn-ing og sjálvræði. Tilgongdin hjá okkum skal vera merkt av nýtslumerktari hugsjón og hava støði í felags áhugamálum.

Danskur uttanríkispolitikkur skal framhaldandi byggja á grundleggjadi virðini hjá okkum, ikki minst fólkaræði og mannarættindi. Rættidi hjá kvinnum og gentum, minnilutum og arbeiðstakarum. Frælsi at tala, hugsa, trúgva og frítt at koma saman. Og rætturin til eitt lív uttan píning.

Vit skulu styrkja virðini og rættindini hjá okkum við ansi fyri tí politiska veruleika, vit liva í. Vit skulu duga betri at lurta og skilja áskoðanina hjá øðrum. Og vit skulu hava støði í felags áhugamálum og donskum førleikum, so vit munadygt kunnu vera við til eina burðardygga menning. Vit skulu góðska og víðka javnbjóðis samvinnu, ikki lata hurðar aftur. Tvístøður eru altð, tá vit samvinna við onnur, sum ikki hava sama virðisgrundarlag sum vit. Men tað má ikki halda okkum frá at samstarva á økjum við felags áhuga – ella samskifta atfinningarliga, tá vit eru ósamd.

ES hevur ein avgerandi leiklut í møguleikunum hjá Dan-mark at uppbyggja javnbjóðis samvinnu. Tí skulu vit arbeiða fyri, at ES talar við somu rødd á alheimspallinum. Vit skulu í ES samskipa og miðvíst tríva út til viðkomandi lond. Tað er bæði tørvur á stimbraðum politiskum samskifti og á, at ES í enn størri mun bjóðar ítøkiligar, burðardyggar loysnir, sum eru tillagaðar staðbundnan eftirspurning. Tað geldur í Asia, í Afrika og í Latínamerika. Global Gateway-átakið hjá ES, ið miðjar eftir at røkja áhugamálini hjá ES við at veita nýggjar burðardyggar dygdaríløgur í stóran mun, inniheldur menn-ingarmøguleikar til júst tað. Handilspolitikkurin skal somu-leiðis undirstuðla samvinnu og snúiliga ætlað mál hjá ES, samstundis við at stimbrað samstarv millum ES og sam-vinnulond fer at tryggja betri atgongd til týdningarmiklar vakstrarmarknaðir og styrkja veitingartrygdina í ES.

Úrslitagóða myndugleikasamstarvið, har danskir førleikar eru uppií, er eitt av týdningarmestu uttanríkispolitisku am-boðunum hjá Danmark í átakinum at skapa javnbjóðis samvinnu. Vit skulu serliga halda fast við og stimbra myndugleikasamstarv, ið er til frama fyri grønu broytingina best møguliga gjøgnum førleika- og vitanaruppbygging í samstarvslondum. Tørvur er eisini á, at vit hugsa okkara

menningarsamarbeiði sum ein saman-tvinnaðan part av okkara heildarátaki. Vit skulu tryggja, at tað í enn størri mun er við til at finna felags loysninir á al-heims-fevndar trupulleikar, undir tí stríðið móti fátækdømi og veðurlagsbroytingum. Tað fer at verða eitt týdningarmikið støði hjá næstu menningarpolitisku ætlanini, ið fer at verða grundað á mannarættindi.

### Asia og Indiahavs- og Kyrrahavsøkið

Alheimsfevndu valdsumskaranirnar merkja, at Asia og Indiahavs- og Kyrra-havsøkið í størri mun er heimsins bú-skaparligi og heimspolitiski tyngdardepil. Kina, India, Indo-nesia, Japan og Suðurkorea fara sum heild at hava slaka helvt av vøkstrinum í heiminum fram móti 2030, meðan ES og USA fara at hava góðan triðjapart. Í økinum eru samstundis øktir trygdarpolitiskir spenningar. Henda gongd skundar undir økt danskt og evropiskt sendiharraligt og búskaparligt virk-semi.

Indiahavs- og Kyrrahavsøkið er høvuðsfarleið hjá heims-umfatandi handli, og sum siglingartjóð hevur Danmark greið-an áhuga í, at frí sigling er tryggjað. Vit skulu samstundis tríva í teir møguleikar, sum vakstrarmarknaðarnir í økinum bjóða, bæði politiskt og handilsliga. Tað hevur serliga dansk-an áhuga at sam-starva um grøna broyting, burðardygd og talgilding. Vit skulu tí stimbra veran-di týdningarmikla grøna samvinnu við Japan, India, Suðurkorea og Indonesia umframt fáa í lag nýggja týdningarmikla samvinnu við lond sum Avstralia og Vietnam. Vit skulu samstundis finna møguleikar fyri uppaftur meiri samsamstarvi í økinum, undir tí við Samskipan Landsynningsasiatiska Tjóða (ASEAN).

### Kina

Við viðurkenning av, at vit leingi hava verið ov góðtrúgvin, hava Danmark, ES og okkara sameindu munandi hert til-gongdina til Kina seinastu árini. Tað hevur verið ein natúrlig og røtt andgerð í sambandi við atferðina hjá Kina.

Samstundis er Kina ein óundansleppandi alheimsfevndur politiskur og bús-kaparligur táttur og harumframt heimsins størsti vakstrarhúsgassútlátari. Tað eru vit noydd til at halda okkum til. Vit skulu tí handfara avbjóðingarnar, men eisini samstarva, har tað tænir okkara áhugamálum. Kina-politikkurin hjá Danmark skal framhaldandi vera heil-hugaður, gløggskygdur og veruleikakendur, grundfestur í eina felags strategiska tilgongd í ES og nær í samskifti við USA og tey sameindu í NATO.

### Afrika

Afrika er grannin hjá Evropa og ein heimspartur í vøkstri, bæði politiskt, bús-kaparliga og fólkafrøðiliga. Tað inniheldur stórar menningarmøguleikar fyri sterka samvinnu. Afrika er samstundis merkt av umfatandi avbjóðingum, undir tí váp-naðum samanbrestum og øðrum manna- og náttúru-skaptum kreppum. Vit skulu tí stimbra bæði okkara egna og sambandið hjá ES við Afrika og Afrikasamveldið fyri at finna felags loysnir á alheimsfevndum avbjóðingum. ES skal vera framum-tikni og næsti samstarvsfelagin hjá Afrika tvørtur um stjórnarmál og tól. Komandi Afrika-ætlan fer at stýra danska átakið fyri sterkari samhugsing og stimbran av tvílandaligum og evropiskum framtøkum tvørtur um okkara luttøku.

Menningarpolitiska átakið fer framhaldandi at verða ein miðstøðuligur liður, men tað er alneyðugt at fáa styrkt politiska, búskaparliga og trygdarpolitiska samstarvið við afrikansku felagarnar. Londini hava ymisligan tørv og áhuga-mál. Tessvegna skulu vit uppbyggja miðvísa, javnbjóðis og álítandi samvinnu grun-daða á felags áhugamál. Átak okkara skal vera við til at skapa politiskt støðufesti og trygd, burðardygga búskaparliga menning og strategiska sjálvstøðu hjá lond-

unum, umframt at byrgja fyri óregligu fólkaflytingini. Tað krevur, at vit kunnu veita freistandi loysnir, sum londini eftirspyrja, undir tí íløgur og stuðul til grøna broyting. Tí skulu vit eisini hugsa tól saman og hava í brennidepli at finna burðardyggar, varandi og staðbundið grundfestar loysnir.



Viðmerking: Gongdin í BTÚ fyri ávís lond, leypandi prísir. Kelda: Oxford Economics

## Reglugrundaða heimsskipanin og tað margsíðaða

Herda alheimsfevnda strategiska kappingin leggur trýst á reglgrundaðu skipanina og margsíðaðaða samsatrvið. Ein heimsskipan, ið vit sum eitt lítið land hava havt gagn av. Tað er serliga álvarsligt í eini tíð, har vit standa framman fyri bæði valdsumskaranum og alheimsfevndum avbjóðingum eins og fátækradømi, ið krevur heimsumtatandi loysnir. Danmark skal halda fram við sínum stóra og ótvískiljandi stuðli til ST-sáttmálan og tað reglugrundaða samstarvið. Har vald ikki gevur rætt. Har alheimsfevndir trupulleikar sum veður-lagsbroytingar og lívmargfeldi verða loyst gjøgnum marg-síðað samstarv.

Uppstilling Danmarks til ST-trygdarráðið 2025-2026 er tí frammarlaga raðfest. Danmark skal her vera í siðbundna leiklutinum sum brúgvasmiður og arbeiða uppbyggjandi fyri, at Trygdarráðið kann virka og náa úrslitum, eisini undir torførum korum. Við tryggum fótfesti í fólkarættinum skulu vit arbeiða fyri at halda fast í virðingini fyri teim felags spælireglunum, ið eru so avgerandi fyri trygdina hjá lít-

lum londum. Samstundis skulu vit streingja á fyri at fáa eina meira heildarvendari, og við tí langskygdari, tilgongd til at fyri-byrgja og stilla kreppur og stríð, ið valda stóra menniskjaliga líðing og eisini ávirka trygdina í okkara parti av heiminum.

Vit skulu vera við til at endurhugsa altjóða fíggjarliga arkitekturin, tá tað geldur margsíðaðu menningarbankarnar og so framvegis, so hann eisini í framtíðini kann vera við til at handfara veðurlagskreppuna, skuldarkreppuna og alheims-fevndu fátækratrupulleikarnar. Vit skulu stiðja arbeiðið við at betra og framtíðartryggja WTO. Endaliga skulu vit styrkja slagmáttin hjá ES sum margsíðaður virkandi og útbyggja samvinnuna hjá ES við ST, Afrika Samveldið, ASEAN og Arabisku Samgonguna.

## Veðurlag

Veðurlagskreppan størsta avbjóðing í 21. øld. tað krevur alheimsfevnt samstarv og atgerð, um vit skulu sleppa undan ómetaligum búskaparligum og trygdarpolitiskum umframt umhvørvis- og veðurlagsligum avleiðingum. Danmark skal framhaldandi ganga fremst í alheimsfevnda veðurlags-átakinum.

Donsk ávirkan altjóðaliga á veðurlagsøkinum er grundfest í, at vit tjóðarliga hava sett nøkur av heimsins mest framsøknu veðurlagsmál, díkt á grønu broytingina og tikið leiðslu at tryggja evropiskt orkuóheftni. Vit hava tí serligar fortreytir at vera brúgvasmiður og skipa samgongur á veðurlags-dagsskránni. Danska tilgongdin til altjóða veðurlagspolitik veldst um eina langa røð av sínámillumundirstyðjaðum átøkum við politiskum samskifti, tvílandaligum og margsíðaðum menningarsamstarvi, altjóða støðum sum COP-samráðingar, grønur útflutningur, myndugleikasamstarv um-framt altjóða samgongum og samvinnu.

Í COP-samráðingunum skal Danmark eins og undir sein-astu COP-samráðingunum átaka sær ein leiðandi leiklut fyri at leggja trýst á fyri at økja framsøknina í mun til veðurlags-átakið og tillaging til veðurlagsbroytingarnar, serliga við-víkjandi viðbreknastu londunum. Trúvirði merkist á Dan-markar virksemi í veðurlagssamráðingunum, og Danmark hevur sum lítið, framsøkið land góðar fortreytir fyri at økja alheimsfevndu framsøknina.
Við framsøknum donskum veðurlagsstuðli skulu vit har-afturat framvegis styrkja brúnna til lond uttan fyri Evropa, ið hava tørv á stuðli, samvinnu, ítøkiligum loysnum, vitan og royndaskifting til at samanbinda sosialt rættvísi, búskaparliga menning á ein hátt, ið er tillagaður ta hóttan, sum veður-lagsbroytingarnar eru. Samstundis skulu vit styrkja sam-starvið við størstu útlátararnar og hála teir ein meira veður-lagsframsøknan veg, so vit kunnu liva upp til París-avtal-una og halda lív í 1,5-stigamálinum. Tað skal millum annað fara fram gjøgnum sterkt virkni í veðurlagspolitikkinum hjá ES og gjøgnum okkara grønu strategisku samvinnu, myndug-leikasamstarv og grønar loysnir. Alt tað dúvar á okkara freist-andi grøna samfelagsmyndil, har grøn broyting fylgist við bú-skaparligum vøkstri.

## Heimspolitiskar avbjóðingar hjá donskum virkjum

Donsku virkini eru týdningarmiklir samstarvsfelagar. Tey kunnu vera við til at røkja donsk og evropisk áhugamál, og tey kunnu bjóða loysnir á alheimsfevndar avbjóðingar innan øki sum grøna broyting, heilsu og at menna nýggja avgerandi tøkni.

Samstundis virka donsk virki í dag undir broyttum rammu-treytum merktum av heimspolitiskum ótryggleika, veðurlags-broytingum og framsøknum veðurlagsstevnumiðum umframt tøkniligum frambrotum. Til dømis hava vit sæð, hvussu kríggj og revsitiltøk frá degi til dags kunnu lata marknaðir aftur ella tálma veitingarketur. Tað hevur váðar og tvístøður við sær, men eisini nýggjar møguleikar.

Vit skulu hjálpa virkjunum við at stýra í einum ótryggum heimi við torgreiddum avbjóðingum. Virkini hava øktan eftirspurning eftir ráðgeving orsakað av alheimsfevndu veitingunum, russiska innrásin í Ukraina hevur havt við sær. Vit skulu styrkja heimspolitisku virkisráðgevingina um til dømis revsitiltøk, útflutningseftirlit, íløgusnarkanning og avgerandi tøkni.




Viðmerking: Fólkafrøðiliga gongdin í heimspørtunum, prosentpartur av heimsins íbúgvum. Kelda: UN, Department of Economics and Social Affairs, Population Division (2022). World Population 2022. Online Edition.

## KAPITTUL 3: Eitt mótstøðuførari samfelag

Í áratíggju hava vit gjørt okkum til góðar av mongu fyri-mununum av alheimsgerðini. Danmark hevur sum lítil, opin búskapur verið forsprákari fyri fríhandli og at uppbyggja ein sterkan felags marknaða í ES. Donsk virki hava gjørt sær til góðar av, at alheimsfevndar virðisketur eru uppbygdar, har donsk serfrøði og vitan hava riggað. Sjálvt um fyrimunirnir við alheimsgerð ikki altíð hevur verið javnbýtt, so hevur opin alheimsfevndur samhandil sum heild givið vøkstur og múgv-inskap bæði í Danmark og í umheiminum. Soleiðis skal tað framvegis verða.

Men alheimsgerðin broytist. Har fyrr størst møguligi vøkst-ur og múgvinskapur vóru í miðdeplinum, koma trygdar-politiskar áskoðanir í størri mun til umhugsan. Tað geldur í Kina. Tað geldur í USA. Tað geldur í ES. Og so er eisini í Danmark.

Sjálvt um fyrimunirnir við alheimsgerð ikki altíð hava verið javnbýttir, so hevur

opin alheimsfevndur samhandil sum heild givið vøkstur og múgvinskap bæði í Danmark og í um-heiminum.

## Nýtt viðbrekni og hóttanir

Tað gerst støðugt greiðari, at morgindagsins hóttanir og viðbrekni í størri mun eru blendingslig. Atsóknin at Nord Stream-gassrørleiðingunum í Eystrasalti 2022 hevur lagt dent á, at avgerandi undirstøðukervi kemur undir økta verju. Net-hóttanin er framvegis sera stór, bæði viðvíkjandi njósning og misbroti, eins og serliga Russland nýtir blendingslig amboð sum ávirkingaratsóknir við tí í hyggju at burturmata fólka-ræðið og savningarmegina hjá okkum.

Alheimsfarsóttir og aðrar alheimsfevndar heilsuhóttanir kunnu eftir stutta tíð fáa stórar avleiðingar fyri alt frá trygd til búskap.
Fólkavøkstur, óstøðuleiki, veðurlagsbroytingar umframt øktir prísir og matvøruótryggleiki hava við sær vanda fyri øktari óregluligari fólkaflyting frá økjunum nær Evropa.

Handils- og ídnaðarstjórnarmálini umframt øki sum orka, heilsa, matvørur, gransking, talgilding og menningin av nýggjum tøknum verða í størri mun vavd saman við okkara uttanríkis- og trygdarpolitikki. Vit skulu tí stimbra evnini hjá okkum at hugsa tvørturum, so vit munadygt kunnu handfara torgreiðu hóttanarmyndina fyri framman, og gera danska samfelagið meira mótstøðuført í mun til avbjóð-ingarnar og kreppurnar í framtíðini.




Viðmerking: Fólkafrøðiliga gongdin í heimspørtunum, prosentpartur av heimsins íbúgvum. Kelda: UN, Department of Economics and Social Affairs, Population Division (2022). World Population 2022. Online Edition.

### Mótstøðuføri og opin strategiskur sjálvsavgerðarrættur

Danmark skal fáa økt mótstøðuføri gjøgnum tættari evropisk samstarv. Okkum tørvar, at ES kann virka skjótt og máttmikið, tá kreppurnar raka. Danmark skal tí arbeiða fyri, at ES verður styrkt gjøgnum opnan strategiskan sjálvsavgerðarrætt.

Vit skulu fyrst av øllum minka um hættisliga bundnið og viðbreknið í Danmark og Evropa. Tað geldur serliga orku, tá tað snýr seg um Russland, og avgerandi ráevni og tøkni, tá tað snýr seg um Kina. Vit skulu spjaða veitingar okkara í breiðan mun og styrkja evropiska framleiðslu gjøgnum fríhandilsavtalur og framhaldandi arbeiða við felags marknaðinum – eisini tá tað merkir torførar neyðsemjur. Skjótari verkseting av varandi orku er ein avgerandi partur av svarinum. Her hevur Danmark munadyggar loysnir at bjóða. Samstundis skulu vit saman við hinum ES-londunum hugsa meira strategiskt í útflutningseftirlitinum. Økt mótstøðuføri krevur somuleiðis, at vit framhaldandi skilfast snarkanna útlendskar íløgur og økja eftirsketnið við váða í sambandi við samstarv um gransking og nýmenning innan sam-felagsstýdningarmikil øki. Komandi tjóðarliga strategiin fyri veitingartrygd skal tryggja, at vit ikki gera okkum óneyðuga viðbrekin, og at samfelagstýðandi eginleikar framhaldandi kunnu virka, um veitingarkreppur skuldu borið á.

### Mótstøðuførur handils- og ídnaðarpolitikkur í ES við ansi fyri javnvág

Evnini til sjálvi at seta kósina hjá tí samfelag, vit vilja hava, treyta bæði mótstøðuføri og ávís evni til at framleiða og handla okkum fram til tað okkum tørvar. Við mót-støðuførum handils- og ídnaðarstjórnarmálum í ES kunnu vit tryggja Evropa og Danmark eina sterka støðu innan strategisk øki og tøkni. Tað geldur ikki minst ta tøkni, sum undirstiðjar grønu broytingina. Tað skal vera við til, at Evropa gerst sjálvbjargnari, samstundis við, at felags marknaðurin og alheimsfevnd kappingarevni hjá ES stimbrast.

Alt hetta merkir ikki, at Evropa skal afturlata seg. ES og Danmark skulu framhaldandi vera slóðbrótarar fyri alheims-fevndan samhandil. Vit skulu tryggja framtíðar grundar-lagið fyri grønum vøkstri og múgvinskapi í Danmark og umheiminum. Tað krevur felags marknað í menning, skyn-saman fíggjarpolitik og ábyrgdarfullan búskaparpolitik. Virki skulu framhaldandi kunna selja vørur og tænastuveitingar á marknaðum í triðjalondum, og alheimsfevnd innflyting og veitingartrygd er altýðandi viðvíkjandi millum annað fram-leiðslu hjá virkjum. Men vit skulu hava ans fyri strategisku áhugamálunum hjá Danmark og Evropa. Vit skulu hugsa meira strategiskt, tá vit í ES gera handilsavtalur við triðjalond. Vit skulu skapa sjálvbjargni, har tað er neyðugt, og tryggja virkisfrælsi við ikki at leggja øll eggini í somu kurv. Vit skulu vera til reiðar at verja áhugamálini hjá ES móti óreiðiligari handilsmannagongd og búskaparligari noyðslu. Vit skulu ikki halda, at umheimurin leggur trygdarpolitikkin til viks, tá hann handlar við okkum.

Vit verða noydd at ganga vøgugongd. Øðrumegin skulu vit ikki vera strategiskt heft at Kina ella gloyma váðarnar við at vera á kinverska marknaðinum. Hinumegin hava Danmark ella ES heldur ikki áhuga í at loysa okkum frá Kina ella undir-meta vakstrarmøguleikarnar hjá donskum útflutningi. Men vit skulu leggja doyin á javnbjóðis marknaðaratgongd og handilstreytir hjá donskum og evropisku virkjum í Kina.

Handilsbandið millum Evropa og USA er týdningarmikið fyri donsk og evropisk virki, og vit skulu arbeiða fyri at styrkja tað. Samstundis skal ES seta krøv um reiðilig kapping-arkor á amerikanska marknaðinum og tryggja langskygdu kappingarevnini hjá Evropa.

### Danskar styrkistøður

Útflutningurin hjá donskum virkjum, altjóðagerð og van-liga samansjóðingin í heimsbúskapin er eitt týdningarmikið støði undir donskum vøkstri og vinnu. Altjóða íløgur, nógvur nýmenningarmáttur og góðar gávur eru munandi liður í at styrkja kappingarevnið hjá Danmark. Tí hava vit tørv á at styðja danskar styrkistøður innan til dømis grøna tøkni og broyting, life-science, tólmennistøkni, matvørur, talgilding og sigling.

Tað kunnu vit ikki gera uttan ES, har vit skulu arbeiða fyri at tryggja best møguligar rammutreytir fyri donsk virki. Danmark skal arbeiða virkið fyri, at geirastjórnarmálini hjá ES undirstuðla donsk áhugamál og styrkistøður, og at ES er við til at stríðast móti tollverju og styrkja javnbjóðis kapp-ingarkor alheimsliga. Vit skulu stuðla virkjum við at arbeiða fyri støðugum veitingar- og virðisketum og ráðgeva teimum um uttanríkis- og trygdapolitiskar spurningar. Og vit skulu halda fram við myndugleikasamstarvi við samstarvsfelagar, ið hava ein týdningarmiklan leiklut í donskum útflutningi. Komandi alheimsgerðarstrategiin hjá stjórnini skal vera við til at undirstuðla framhaldandi góð kappingarevni fyri donsk virki fram móti 2030 fyri at styrkja langskygda vøksturin í Danmark.

### Grøna broytingin

Grøna broytingin er av størsta týdningi fyri at tryggja egna óheftnið hjá Evropa at lívrunnum brennievnum og við tí økt mótstøðuføri.

Tann slóðaraleiklutur, sum Danmark hevur fingið gjøgnum íløgur í áratíggju í millum annað vindorku og orku-skynsemisgerð, er samstundis eitt dømi um rættstundis vandni, sum í dag gagnar okkum eins væl búskaparliga og uttanríkispolitiskt. Mong lond eftirspyrja danskar loysnir, og Danmark er í dag við í myndugleikasamstarvi á orkuøkinum í mongum londum. Tað lýsir eisini, at grøna broytingin inni-heldur týdningarmiklar handilsligar møguleikar fyri Dan-mark.

Vit skulu samstundis tryggja, at vit ikki í grønu broytingini uppbyggja nýtt hættisligt óheftni, sum kann verða okkum dýrtkeypt í framtíðini. At skapa tryggar, støðugar og burð-ardyggar veitingarketur og atgongd til avgerandi tilfeingi krevur nýggja altjóða samvinnu. Av somu orsøk fer grøni ídnaðarpolitikkurin hjá ES at hava ein týdningarmiklan leik-lut bæði fyri evnini hjá okkum til at broyta okkum og fyri okkara uttanríkispolitisku stevnumið.

### Talgilda øldin

Allastaðni hjástaddi leikluturin hjá tøknini og elvda ó-heftnið hjá samfelagnum at henni merkir, at tøkni er vorðin uttanríks- og trygdapolitikkur. Á alheimspallinum fer tøknilig kapping fram millum Kina og USA. Vit skulu standa saman í Evropa og tryggja, at ES verður ein leikari og ikki verður skert til ein leikvøll. Danmark skal arbeiða fyri, at ES framhaldandi er á odda í átakinum alheimsfevnandi at tryggja ábyrgdarfulla, skipaða og rættvísa tøkniliga menning við virðing fyri grundleggjandi rættindum og fólkaræði. Tað geldur ikki minst innan vitlíki, ið bæði inniheldur góðar menningarmøguleikar og stórar fellur. Hugsað verður um hesa gongd í nýggju tech-diplomati-strategiini hjá stjórnini.

Samskiftið við vinnulívið og borgarasamfelagið um reiði-liga tøkniliga menning er týdningarmeiri enn nakrantíð. Her fer Danmark framhaldandi at ganga fremst fyri at dubba Danmark móti nethóttanum og byggja altjóða samgongur. Stjórnin fer eisini at arbeiða fyri at útbyggja danskar styrki-støður, til dømis innan skamtatøkni, ið hevur menning-armøguleika til sum frá líður at kollvelta alt heilt frá grønari tøkni um heilsu til framtíðarinnar verju. Tað skapar nýggjar møguleikar hjá donskum virkjum og hjá Danmark sum ein talgildur sýnisgluggi og undangongu-

land. Vit skulu sam-stundis tryggja, at avgerandi tøkni, ið verður ment og fram-le-idd í Danmark, ikki á óynsktan hátt verður flutt til onnur lond og endar í rangum hondum.

### Trydgin í Danmark og Evropa

Hóttanin frá virkni hjá fremmandum ríkjum í Danmark, undir tí fregnarvirkse-mi og njósning, er eyðsýnd, víðskygd og áhaldandi. Harafturat koma nýggjar og blendingsligar hóttan-ir, har serliga hóttanin frá nethóttan og -misbrot frá bæði ríkisligum og ikki-ríkisligum virkandi er sera stór. Tað krevjur økta hernaðarliga og borgarliga verju móti blendings-ligum hóttanum sum til dømis nethóttanir og ávirkingarátøk umframt økta net- og kunningartrygd og styrkt fregnarátak.

Yvirgangshóttanin móti Danmark er framvegis álvarslig. Vantandi búskaparlig menning og harðrent stríð í millum annað Sahel og Miðeystri er við til at skapa gróðrarlíkindi fyri óstøðuleika, víðgongdargerð og, at harðrendar víðgongdar rørs-lur verða útbreiddar. Og avleiðingarnar kunnu í einum alheimsfevndum samfelag brátt raka Danmark. Tað krevur framhaldandi margsíðugt virksemi og samskipan og eitt munadygt fregnarsamstarv við felagarnar hjá Danmark.

Óstøðuleiki kann samstundis díkja á eina óregluliga fólkaflyting móti Evropa eitt tíðarbil, tá fólkaflytingartrýstið á mørkini hjá ES longu er økt. Seinastu árini hava víst, at hvørki smuglarar ella ríki aftra seg við kensluleyst at misnýta flutt fólk sum trýstivápn móti Evropa. Økta óregluliga fólka-flytingin móti Evropa er í vanda fyri at leggja samfestið og felags marknaðin undir trýst. Tað kann endaliga burtur-mata frælsa smidleikan í Evropa.

Tað er bæði ein alheimsfevnd og ein evropisk avbjóðing, sum krevur, at evropiska friðskjólsskipanin verður broytt við denti á tað uttanífrákomandi. Stjór-nin arbeiðir fyri hald-góðum evropiskum loysnum á avbjóðingum frá óregluligari fólkaflyting, undir tí í samstarvi við triðjalond innan karmarnar av okkara altjóða skyldubindingum.